# Størsta avbjóðingin nakrantíð hjá Toda

**Hóast FCK í dag er annar parturin í steypafinaluni og sunnudagin fer at spæla finalu um danska meistaraskapin, so gongur lívið hjá Toda og teimum sína vanligu gongd**

TINDURIN HJÁ ÚTISETA
*Jóannes Hansen*



*Todi avmyndaður eftir DM-sigurin í fjør. FCK hevur tveir sera týdningarmiklar dystir fyri framman. Steypafinalan móti OB Kristi Himmalferðardag og landskappingardysturin móti Brøndby sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Todi Jónsson skal í dag og aftur sunnudagin til størstu próvtøkurnar, sum hann nakrantíð hevur verið til í sínum langa fótbóltslívi. Seinnapartin í dag verður finalan í DONG steypakappingini beinleiðis sjónvarpað á TV3 rásini, og sunnudagin verður aftur sjónvarpað, tá mest avgerandi dysturin í kappingini um DM í hesum kappingarárinum verður spældur í Parkini.

Í dag er OB í Parkini, og sunnudagin verður mótstøðuliðið Brøndby.

Tað eru stórar og spennandi uppgávur, sum standa fyri framman, men í FCK gera teir nógv fyri, at gerandisdagurin í felagnum og ikki minst millum spælararnar skal vera so vanligur, sum tað á nakran hátt ber til.

Hóskvøldið var stórt FCK tiltak í Cirkusbygninginum í Keypmannahavn, sum FCK eigur. Har var ein rúgva av fólki. Málið við tiltakinum var at fáa pengar til vega til Reyða Kross. Tað eydnaðist væl, tí Reyði Krossur fekk 128.900 krónur burturúr. Millum tiltøkini var uppboðssøla av pakkum, sum bóru nøvnini á nøkrum fáum spælarum. Ein pakki nevndist Todi pakkin, og hann fór fyri góðar sekstan túsund krónur.

– Í tí pakkanum var ein ferð til fyrsta Europa Cup dystin hjá okkum á útivølli eftir summarsteðgin, og ein annar lutur var troyggjan, sum eg spældi síðsta landsdystin í, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

### Jarðbundnir

Tá vit tosaðu við føroyska álopsessið hjá FCK var ikki greitt, hvussu liðið fór at síggja út í steypafinaluni, men eingin ivi tykist vera um, at Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu. Í hvussu so er hava teir í OB víst FCK álopinum serligan áhuga. Og tá rokna teir við, at tað verða Todi Jónsson og Sibusiso Zuma, sum verða tveir teir fremstu menninir hjá FCK. Í donskum fjølmiðlum verður aftur nú tikið til, at einki felag hevur so vandamikið álop sum FCK, og so verður lagt afturat, at Peter Møller er vorðin jokarin, sum aftur og aftur hevur víst, at hann er førur fyri at fara á vøllin og skora avgerandi málið.

– Venjarin ger av, hvørjir fara at spæla, og hvørjir skulu sita á beinkinum. Eg havi kent meg væl seinastu tíðina, og eg kann ikki annað enn siga, at tað hevur gingið hampuligt. Eingin ivi skal vera um, at eg sera fegin ynski at vera millum teir fyrstu ellivu – bæði í steypafinaluni og ímóti Brøndby sunnudagin, sigur Todi Jónsson.

Tað kundi kanska hugsast, at tað varð gjørt nógv hóvasták burturúr í FCK, nú teir standa fyri tveimum so sera týdningarmiklum dystum. Men Todi Jónsson sigur okkum, at alt gongur sína vanligu gongd.

– Dagurin undan finaludegnum gongur sína vanligu gongd við venjing og tí, sum hongur uppií. So halda vit frí, inntil vit skulu møta í Parkini hálvan annan tíma undan dystarbyrjan. Uttan mun til hvussu tað fer at ganga í finaluni, so fara vit at halda rútmuna. Vit mugu vera væl fyri sunnudagin. Tí verður venjing á skránni fyrrapartin fríggjadagin, sigur Todi Jónsson.

### Todi toppskjútti

FCK hevur tvær ferðir seinastu árini verið í steypafinaluni. Tá teir í 1997 vunnu 2–0 á Ikast, var Todi Jónsson framvegis Lyngby spælari. Tá teir í1998 taptu 4–1 ímóti Brøndby, var Todi á liðnum.

Todi Jónsson er ikki hvør sum helst í FCK. Av spælarunum, sum nú eru í hópinum, er hann tann, sum hevur skorað flest mál tilsaman. Hann er skrásettur fyri 44 mál í týdningarmiklum dystum. Næstur honum er Sibusiso Zuma, sum hevur skorað 30 mál. So koma Christian Lønstrup (18), Peter Møller (16), Christian Poulsen (11) og Thomas Røll (10 mál). Í hesum kappingarárinum hevur Todi skorað sjey mál (seks í landskappingini og eitt í steypakappingini). Helmingin av málunum í landskappingini skoraði hann í síðstu viku.

Millum spælararnar á vøllinum í dag, sum í 1998 vóru á FCK liðnum saman við Toda Jónsson, verður Karim Zasa. Í 1998 var hann málverji hjá FCK. Nú er hann málverji hjá OB.

– Vit báðir tosa viðhvørt í telefon saman, og tað kemur eisini fyri, at vit hitta hvønn annan, sigur Todi Jónsson, sum sjálvandi ikki fer at hugsa um vinarlag og gamalt samstarv, tá hann seinnapartin fer at standa andlit til andlit við OB málverjan.

– FCK er greiður favorittur. Tá vit spældu ímóti teimum fyri hálvum øðrum mánað síðani, vunnu teir 4–0. Um vit skulu hava nakran møguleika hesa ferð, so skulu vit halda tætt í verjuni, og tað megna vit bara, um álopsspælararnir verða hildnir í stuttum tjóðri, sigur OB málverjin.

– Vit mugu finna okkum í at vera favorittar. Men ein finala er nakað serligt. Tá spæla allir sum fyri lívinum. Tað eru so nógv dømi um, at tað í finalum ikki hevur gingið, sum tað varð roknað við. Tað vita vit væl, og tað er heilt víst, at vit fara ikki at undirmeta OB, sigur Todi Jónsson, sum seinnapartin í dag kann gerast fyrsti føroyingurin, sum vinnur donsku steypafinaluna.

# FCK svimur í pengum

**Í hesi vikuni hava teir lagt síðstu hondina á tekning av partabrøvum fyri 135 milliónir krónur**

ÚTISETA FELAG
*Jóannes Hansen*

Tað er eingin ivi um tað. FCK er ríkasta fótbóltsfelagið í Danmark. Tað hava teir verið so leingi, og í hesi vikuni er aftur ein stórur sekkur við pengum lagdur afturat frammanundan stóru rúgvuni.

Í rúsinum av ítróttarliga undanvindinum í vár hava teir teknað nýggj partabrøv. Nú undan steypafinaluni og spennandi landskappingardystinum ímóti Brøndby hava teir kunngjørt úrslitið. Teir hava teknað 600 túsund partabrøv til kursvirði 225. Tað hevur givið 135 milliónir krónur í kassan.

– Pengarnir skulu brúkast til at vera við til fíggingina av teimum trimum tornunum í Parkini, sum vit higartil ikki hava átt, sigur Flemming Østergaard, sum er stóri maðurin í FCK. Tornini kosta tilsaman 310 milliónir krónur.

### Meiri pengar

Sigur í steypafinaluni og sigur í kappingini um DM fara at hava við sær, at uppaftur meiri gull fer at renna niður í frammanundan fulla pengakassan hjá FCK. Hvussu nógv ber ikki ítøkiliga at siga. Men umframt peningaupphæddir fyri sigrarnar, so ber Europa Cup luttøkan peningaupphæddir við sær, og tað fer eisini at verða uppaftur meiri populert, enn tað longu frammanundan er, at verða stuðul hjá FCK.

Í FCK rokna teir við, at tað fara at vera umleið 30 túsund áskoðarar til finaluna í dag. Av teimum verður roknað við, at umleiðs seks túsund fara at koma úr Odense. Til dystin ímóti Brøndby sunnudagin verður fullsett. Tað vil siga umleið 43 túsund áskoðarar.

Ætlanin er, at føroyingarnir, sum saman við Sosialinum og Atlantic Airways fara til Keypmannahavnar at hyggja at fótbólti, fríggjadagin skulu hyggja seg um í Parkini.

– Tað verður skipað fyri rundvísing seinnapartin, og tá fari eg at hitta føroyingarnar og greiða teimum frá, hvussu tað gongur fyri seg, tá vit spæla á heimavølli, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn. So mugu fótbóltshugaðir føroyingar vóna, at tað verður ein av steypavinnarunum, sum teir fara at hitta fríggjadagin!



# TV3 verður á JackWays

**Væntandi verður sjónvarpsrásin, TV3, til staðar, tá føroysku áskoðararnir sunnudagin fara at hita upp til danska stórdystin**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk*



*Bæði fríggjakvøldið og sunnudagin hevur TV3 í hyggju at gera sendingar frá JackWays. Dansistaðið, sum Todi Jónsson saman við øðrum hevur keypt miðskeiðis í Keypmannahavn*

Flestum kunnugt hevur Todi Jónsson saman við øðrum fyri stuttum keypt nýtt dansistað í Keypmannahavn.

JackWays er navnið á nýggja staðnum, og hóast tað enn er nakað tíðliga at siga, hvørja undirtøku nýggja staðið fer at fáa, so benda tey trý fyrstu vikuskiftini á, at í øllum førum leygarkvøld verður nógv fólk at síggja.

Tey vitjandi verða helst ikki færri í tali, nú knappliga 100 føroyingar leggja leiðina til Keypmannahavnar at hyggja at stórdystinum millum FCK og Brøndby.

Hetta hava eigararnir av JackWays sjálvandi eisini hugsað um, og umframt at opið verður fríggja- og leygarkvøldið sum vant, so verður eisini opið sunnudagin um vikuskiftið.

Tríggjar tímar undan dystarbyrjan, altso klokkan 12.00, verða dyrnar á JackWays latnar upp, og eigararnir vóna, at hópur av áskoðarum fer at nýta hetta høvið, soleiðis at til ber at »savna tropparnar« áðrenn leiðin gongur yvir móti Parkini.

### TV3 verður við

Eigararnir av JackWays eru tó ikki teir einastu, sum rokna við, at fleiri av áskoðarunum fara at nýta hetta høvið. Danska sjónvarpsrásin, TV3, roknar eisini við nógvum fólki, og ætlandi fara teir at hava fólk á staðnum, soleiðis at hetta verður ein partur í marathon-sendingini hjá TV3 sunnudagin. Tá fara teir nevnliga at nýta mest sum allan dagin til stórdystin, sum eftir øllum at døma fer at gera av, hvørt tað verður FCK ella Brøndby, sum verður danskur meistari í ár.

Umframt at senda frá føroysku upphitingini sunnudagin, so er eisini møguleiki fyri, at TV3 fer at hava okkurt annað innslag frá JackWays. Fríggjakvøldið hava teir nevnliga í hyggju at gera eina samrøðu við Toda Jónsson inni á dansistaðnum, og er ætlanin so, at henda samrøðan eisini skal verða partur av sendingini sunnudagin, so tað er veruliga líkt til, at føroyingar sleppa at seta sín dám á alt tað, sum fyriferst kring toppdystin. So er bara eftir at vóna, at føroyingar eisini fara at seta dám á tað, sum fyriferst á grasinum í Parkini sunnudagin.

## Dystir Kristi himmalsferðardag

**1. deild menn**

| | |
|---|---|
| EB/S-VB | Niklas á Líðarenda |
| TB-B68 | Suni Johansen |
| HB-KÍ | Petur Skarðenni |
| Skála-B36 | Jens Petur Brattalíð |
| NSÍ-GÍ | Oddmar Andreasen |

**3. deild menn**

| | |
|---|---|
| AB-ÍF | Johan Krogh |
| TB-B68 | Poul Erik Jacobsen |
| HB-B71 | Georg Rasmussen |
| Royn-B36 | Eyðun Kjærbo |
| FSV-GÍ | Dia Lamhauge |

# Rundferð í Parkini

*Todi Jónsson verður sjálvur við, soleiðis at føroyska ferðalagið kann sleppa at síggja, hvørjar umstøður leikararnir í fremsta danska fótbóltsfelagnum hava á heimavølli sínum*



**Føroyska fótbóltsferðalagið, sum um vikuskiftið verður í Danmark, fær fríggjadagin høvi at kunna seg um umstøðurnar á heimavøllinum hjá Toda og teimum**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk*

Føroyska ferðalagið, sum um vikuskiftið verður í Keypmannahavn á fótbóltsferð, fær fríggjadagin møguleika at síggja heimavøllin hjá Toda og teimum innan ífrá at kalla.

Tá verður nevnliga skipað fyri rundferð í Parkini, og umframt eina guide frá FCK, fer Todi Jónsson eisini sjálvur at greiða frá og sýna fram, hvussu umstøðurnar hjá leikarunum í kanska fremsta fótbóltsfelagnum í Danmark eru.

Rundferðin í Parkini er liður í fótbóltsferðini, sum Atlantic Airways og Sosialurin í felag hava skipað fyri, og sum eftir øllum at døma hevur fingið sera góða undirtøku millum manna. Ferðin er nevnliga útseld, og verða flogførini hjá føroyska flogfelagnum fullfermd bæði miku- og hósdagin til tess at flyta teir 90 áskoðararnar, sum høvdu møguleika at ogna sær ferðaseðil og atgongumerki til dystin.

Sambært tíðarætlanini byrjar rundferðin kl. 15.15 fríggjadagin, og verða tey, sum ætla sær við á hesa, biðin um at møta í góðari tíð á Sportscaféini hjá FCK. Hendan er at finna á suðursíðuni á Parkini, undir sonevndu Carlsberg-tribununi.


